# Vindmyllurnar koyra sum ætlað

**S/P Røkt hevur lagt seg eftir, at vindmyllurnar í Heygadali í Vestmanna skulu nøkta 3% av samlaða orkutørvunum í Føroyum um árið. Sambært stjóranum, Jóhan í Niðristovu hava teir fyrstu tríggir mánaðirnir gingið sum ætlað.**

VINDMYLLUR
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin*

Stóra hendingin í summar innan alternativa orku í Føroyum, var uttan iva, at S/P Røkt í summar fór undir at framleiða vindorku til netið hjá SEV. Vindmyllurnar, Bára, Julia og Sóley hava seinastu tríggjar mánaðirnar rættiliga sloppið at roynt seg, og sambært stjóranum í S/P Røkt, Jóhan í Niðristovu, eru úrslitini nøktandi.

### Nøkta tørvin

Menninir aftanfyri S/P Røkt væntaðu í summar , at tær tríggjar vindmyllurnar fóru at framleiða 3% av samlaða orkutørvunum í Føroyum um árið. Stjórin, Jóhan í Niðristovu sigur, at teir fyrstu tríggir mánaðir hava gingið sum ætlað, og framleiðslan stendur í mát við ætlanirnar, tá hugsað verður um góða veðrið í september og oktober mánað.

– Vit høvdu smávegis byrjunartrupulleikar, men ikki størri, enn okkara menn sjálvir kundu fáa teir í rættlag aftur. Í uppstartsfasuni hevði SEV ein lítlan reguleringstrupulleika millum Mýraverkið og vindmyllurnar, men vit hava einki hoyrt aftur, og tí vænta vit, at alt gongur sum ætlað einki stórvegis, sigur Jóhan í Niðristovu.

Stjórin í S/P Røkt sigur, at felagið hevur onkra hendingaferð havt trupulleikar av ov nógvum vindi, men tað hevur ikki darvað orkuframleiðsluni.

Jóhan í Niðristovu greiðir frá, at vindmegin skal verða millum10-25 m/s til fulla framleiðslu, og fer vindorkan yvir 25 m/s, steðga vindmyllurnar sjálvar framleiðsluni, tí tá er ov harður vindur.

### Sæst frá Mjørkadali

Spurdur, um nógv fólk hava verið og fregnast í á Mýrunum í Heygadali um tær nýggju vindmyllurnar, svarar stjórin í S/P Røkt, at tað var serliga fyrstu tíðina, at fólk leitaðu sær niðan, men seinastu tíðina er talið lækkað.

Jóhan í Niðristovu fortelur, at vindmyllurnar eisini síggjast frá Mjørkadali, og tí kann væl hugsast at fólk heldur leitað sær hagar, enn niðan á Mýrarnar

– Júst hetta tíðarskeiðið av árunum er ikki heilt vandaleyst at fara niðan til myllurnar, tí kemur ísur á myllurnar, mugu fólk verða varðin, tí tað kann ganga skjótt, at fólk fáa ísin sendandi frá vindmyllunum, og tá má ein ansa sær, sigur Jóhan í Niðristovu at enda.



*Tær tríggjar vindmyllurnar hjá S/P Røkt hava nú framleitt vindorku í tríggjar mánaðir, og úrslitini hava verið nøktandi. Stjórin í felagnum, Jóhan í Niðristovu, sigur at hendinga byrjunartrupulleika vóru, men framleiðslan stendur í mát vit tað, felagið hevði væntað*
*Mynd: Savnsmynd*

# Ráðgeving heldur enn eftirlit

**Fyrispurningurin hjá Jógvan á Lakjuni til Annitu á Fríðriksmørk um filmseftirlitið, varð svaraður í tínginum týsdagin. Landsstýrismaðurin í mentamálum tekur undir við samgonguni um, at filmseftirlitið skal takast av. Hon heldur, at størri áherðsla skal leggjast á ráðgeving enn eftirlit**

FILMSEFTIRLITIÐ
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Í samband við fíggjarlógina 2004, er semja um í samgonguni, at filmseftirlitið skal takast av. Hesa ætlan eru nógv ónøgd við, tí tey óttast avleiðingarnar av, at einki eftirlit er við tí siðspillandi tilfari, ið floymir yvir føroysku børnini bæði frá teldu, internetið, sjónvarpi og filmum.

Í samband við, at Filmseftirlitið skal takast av, setti fólkaflokstingmaðurin, Jógvan á Lakjuni ein fyrispurning til landsstýrismannin í mentamálum Annitu á Fríðriksmørk. Hann vildi vita, hvørjar orsøkirnar eru til, at filmseftirlitið skal avtakast, tí tað er eitt álvarsamt stig at taka.

### Broytt miðlastøða

Á løgtingsfundinum seinnapartin týsdagin fekk Jógvan á Lakjuni svar upp á fyrispurningin hjá sær. Annita á Fríðriksmørk segði, at tað vóru tvær høvuðsorsøkir til lógaruppskotið hjá sær um at avtaka filmseftirlitið. Í fyrstu atløgu er tað ein sannroynd, at miðlastøðan er kollveltandi broytt, síðan Filmseftirlitið fór undir sítt virksemi, og í aðru atløgu er talan um eina sparing á fíggjarlógini.

Virksemið hjá filmseftirlitinum fevnir bert um filmar, ið verða vístir alment og sjónbandafilmar, ið kunnu keypast ella leigast. Digitalu miðlarnir, t.e internet, telduspøl og privatu parabolarnir hava seinnu árini í størri mun yvirtikið leiklutin hjá sjónbandafilmum og biograffilmum, men kortini er eingin áseting um digitalu miðlarnar í filmseftirlitinum. Í aftursvari til Jógvan á Lakjuni segði Annita á Fríðriksmørk, at filmseftirlitið er ikki tíðarhóskandi, tá eftirlitið ikki umfatar digitalu miðlarnar.

Landsstýrismaðurin í mentamálum nevndi, at tað í løtuni verður arbeitt í norðurlendskum høpi við, hvussu myndugleikarnir í teimum ymisku londunum kunnu verja børn og ung ímóti tí ótespiliga og skaðiliga innihaldi, ið ofta eyðkennir telduspøl, internetsíðir og tilfar á parapolum dag.

Hon vísti á, at ein verja í ímóti tí ótespuliga tilfari er at geva teimum ungu nøkur dygdargóð alternativ. Norðurlendsku mentamálaráðharrarnir og Norðurlandaráðið hava í hesum sambandi umrøtt at seta ein norðurlendskan fjølmiðlagrunn, sum skal stuðla framleiðslu av dygdargóðum digitalum innihaldi, sum børn og ung fáa eitt alternativ.

### Ráðgeving

Annita á Fríðriksmørk vísti eisini á í aftursvarinum, at hon metti, at tað frá samfelagsins síðu er størri tørvur á ráðgeving enn eftirliti í dag. Hon sipaði til fakliga ráðgeving og upplýsing til foreldrini um eitt nú harðskap í filmum, á internetinum og í telduspølum.

Børn sita í dag í tímavís við hesum miðlum, og tí má samfelagið geva foreldrunum nøkur haldgóð amboð at verja børnini ímóti skaðiliga ávirkaninum, ið nakrir av hesum miðlum kunnu geva.

Landsstýrismaðurin í Mentamálum mælir tískil til, at Filmseftirlitið verður avtikið og játtanin niðurløgd. Dentur skal heldur leggjast á, hvussu vit kunnu skipa fyri ráðgeving og upplýsingin á økinum, og hvør kostnaðurin verður av hesum. Hon nevndi møguleikan fyri, at Fyribyrgingarráðið kann víðka sítt virksemi til eisini at fevna um hesa ráðgeving.

### Víðka filmseftirlitið

Fyrispurningsetarin, Jógvan á Lakjuni, er ikki nógv fyri at avtaka filmseftirlitið. Hann ynskti í tinginum at fáa eitt greiðari svar upp á, hvat kemur í staðin fyri filmseftirlitið, um tað endaliga verður avtikið.

– Vit verða undirdýkt av tilfari, ið er við til at rota samfelagið, og spilla mangar barnasálir. Tað er tí ógvuliga týdningarmikið, at vit framhaldandi varðveita eitt eftirlit við tí sum floymir yvir okkum dag og dagliga, segði Jógvan á Lakjuni í tinginum týsdagin.

Fólkaflokstingmaðurin helt, at samgongan átti heldur at víðka um virkisøkið hjá filmeftirlitinum, so tað í framtíðini eisini fór at fevna um internet, telduspøl og sjónvarp, heldur enn at avtaka stovnin.

### Sálarligur ágangur

Landsstýrismaðurin í familju- og heilsumálum, Bill Justinussen, vísti eisini á, at neyðugt er við einum filtri ímóti tí sálarliga ágangin-um, sum hann kallaði alt ta skaðiliga tilfari, ið floymir yvir børnini í Føroyum í dag. Hann metti, at politiski myndugleikin átti at ganga fremst, og vísa veg á økinum.

Til ætlanina hjá Annitu á Fríðriksmørk um lata Fyribyrgingarráðið taka sær av ráðgevingini á økinum, helt Bill, at ein mátti ansa eftir, at Fyribyrgingarráðið ikki gjørdist ein pottur til koyra ov nógv í, tí ráðið er fyrst og fremst ætlað til viðgera heilsuspurningar.

Anfinn í nýggjum leikluti :

# Løgmaður filmsstjørna

**Tað hevur eydnast Trølla Pæturi at fáa sjálvan løgmann, bankastjóran Jørn Astrup og vinnulívsmennirnar Poul Mohr og Árna Joensen at spæla við í nýggjum barna- og familjufilmi, sum skjótt verður at síggja**

FILMUR
*Annika Biskupstø,*
*praktikantur*

– Jú, vit eru púra ovfarnir av hvussu væl hesir menn duga at spæla sjónleik. Men tað skal helst eisini til í teirra arbeiði, skemtar Niclas Heri Jákupsson, sum umframt at hava tikið stig til filmin, eisini hevur verið við til at leikstjórna og skriva stóran part av handritinum.

– Hetta at vit fingu sjálvan løgmann at spæla film eru vit sjálvandi ómetaliga takksamir fyri. Hansara uppgáva er at halda røðu á Havnarvág tá ið Trølla Pætur og omman, saman við politistunum koma aftur til Føroya, aftaná eina spennandi og ikki heilt vandaleysa ferð í suðurlondum við italiensku mafiuni í hølinum.



*Millum onnur teljast løgmaður, skipasmiðjustjórin og ein bankastjóri millum teirra, sum hjálpa trøllaommuni og soninum í stríðnum móti mafiuni*

### Stjórar í filmsleikluti

Men áðrenn ídna filmsliðið úr Klaksvík hevði fingið løgmannin Anfinn Kallsberg í kassan, vóru nakrar frálíkar senur upptiknar, sum orsøkir vóru at fegnast um.

Í filminum hevur omma TrøllaPætur fingið arbeiði á skipasmiðjuni í Havn og har kemur hon eisini í samband við stjóran á verksmiðjuni Poul Mohr.

– Hetta eru frálíkar myndir, sum tey vaksnu uttan iva fara at taka væl ímóti. Hvussu spennandi eitt nú Poul Mohr og 100 trøllvaksnir arbeiðsmenn í ketildrakt eru í barnaeygum er ilt at vita, men fyri sjálva søgugongdina í filminum er hetta frálíkar myndir, heldur Niclas Heri.

Hann nevnir fleiri upptøkur, sum hann heldur gera júst hendan barnafilmin til nakað serligt. Eitt nú tá ið Árni Joensen stjóri á Skipafelag Føroya skal skipa fyri at farmurin við leikum skal flytast av landinum

– Kanska hava vit verið seraliga hepnir í okkara úrvali av leikarum. Og ein skuldi næstan trúð at Jørn Astrup var professionellur leikari. Vit hava spolað umaftur og umaftur filmsklippið, har bankastjórin og politimeistari sita á skrivstovuni og stara niður í tað skeiva kuffertið. Ikki so løgið at hesir fáa sigarroykin skeivt í hálsin, sigur Niclas Heri Jákupsson, sum eins og hini børnini gleðir seg til nýggi Trølla Pætur filmurin verður alment at síggja.

Tað er felagið Iris í Klaksvík ið framleiður nýggja Trølla Pætur filmin, sum hevur fingið heitið Trøllini og Mafian.

# Børnini síggjast

BØRN
*Annika Biskupstø,*
*praktikantur*

Hvat er so serligt við júst hesi myndini. Jú, hetta eru fyrst og fremst nøkur fitt børn frá útibarnagarðinum Fjallafípan í Klaksvík. Men harafturat so eru tey løtt at leggja til merkis. Tey eru klødd í lýsandi gulum vestum, og børnini síggjast langan veg. Hetta er fyrsti dagurin tey royna vestarnar, men hetta verður frá í dag av ein vanlig sjón. Øll tey 55 børnini hava fingið hvør sín vest og tað eru tey sera fegin um, sigur Eva Jacobsen sum henda morgunin var túr við nøkrum av fjallafípinum. Hon sigur, at hugskotið er nýtt og veit ikki at siga, um nakar annar stovnur hevur roynt hetta áður.

Vestarnir sum børnini nýta eru serliga góðir hesa árstíðina, nú dagarnir gerast stytri og umráðandi er at verða sæddur í ferðsluni.

Fjallafípan er annars ein útibarnagarður sum liggur úti í Grøv við Gravardal í einum stórum nátúrvøkrum øki, har tað gott er hjá børnunum at spæla úti á bønum í nærum øllum veðri.

